gult cyan magenta svart



## Hósdagur 11. januar

### SVF

| | |
|---|---|
| 18.30 | Tá feittið skal burtur - um venjingar og motión |
| 19.00 | Við langfaraskipi á Flemish Cap 1:2 (e) |
| 20.00 | Dagur og Vika við Grannum |
| 20.50 | Hotellið 5 - donsk dramarøð |
| 21.35 | Roomservice - íbúðin verður broytt |
| 22.05 | Krimitímin: Dalziel og Pascoe 1:2 - ensk røð |
| 22.55 | DR-Dokumentar: Søgur av einari politistøð |
| 23.55 | Liðugt |

### Eurosport

| | |
|---|---|
| 07:30 | Rally |
| 08:00 | Biathlon |
| 09:00 | Football |
| 11:00 | Cross-country skiing |
| 12:00 | Tennis |
| 13:15 | Live biathlon |
| 15:00 | Tennis |
| 16:30 | Cross-country skiing |
| 17:30 | Biathlon |
| 19:00 | Speed skating |
| 19:30 | Live football |
| 21:30 | Rally |
| 22:00 | News |
| 22:15 | Tennis |
| 23:45 | Rally |
| 00:15 | News |
| 00:30 | Close |

### BBC Prime

| | |
|---|---|
| 00.00 | TLZ: »Watergate – Scapegoat« |
| 01.00 | TLZ: »Science at War – Enemy of all Mankind« |
| 02.00 | TLZ: »What Have the '70s Ever Done For Us?« |
| 02.10 | TLZ: »Background Brief - Consciousness« |
| 02.30 | TLZ: »The Search For Reality« |
| 03.00 | TLZ: »The Science of Climate?« |
| 03.30 | TLZ: »A Formidable Foe« |
| 04.00 | TLZ: »Buongiorno Italia – Buongiorno!« |
| 04.30 | TLZ: »Megamaths – Money – One Pound to Five Pounds« |
| 04.50 | TLZ: »The Business Hour |
| 05.30 | TLZ: »Follow through« |
| 06.00 | Salut Serge |
| 06.15 | Playdays |
| 06.35 | Run the Risk |
| 07.00 | The Really Wild Show: »Cameroon |
| 07.30 | Ready Steady Cook |
| 08.00 | Style Challenge: »Recovery |
| 08.25 | Change that: »Harrogate« |
| 08.50 | Going for a Song |
| 09.30 | Top of the Pops Plus |
| 10.00 | Antiques Roadshow: »Wisbech |
| 10.30 | TLZ: »Return of the Killer Bugs« |
| 11.30 | Looking Good: »The Diva Show |
| 12.00 | Ready Steady Cook |
| 12.30 | Style Challenge: »Detectives |
| 13.00 | Doctors |
| 13.30 | EastEnders |
| 14.00 | Change that: »Harrogate« |
| 14.25 | Going for a Song |
| 15.00 | Salut Serge |
| 15.15 | Playdays |
| 15.35 | Run the Risk |
| 16.00 | The Really Wild Show: »Cameroon |
| 16.30 | Top of the Pops Global |
| 17.00 | Home Front |
| 17.30 | Doctors |
| 18.00 | EastEnders |
| 18.30 | The big Trip |
| 19.00 | To the Manor born |
| 19.30 | 2 Point 4 Children: »Parent Trap« |
| 20.00 | Casualty: »No More Mr Nice Guy |
| 21.00 | How do you want me?: »I'm Not an Alcoholic |
| 21.30 | Top of the Pops Global |
| 22.00 | Silent Witness: »An Academic Exercise |
| 23.40 | Dr. Who: »Black Orchid« |

### BBC World

| | |
|---|---|
| 00.00 | News – Weather |
| 00.30 | HARDtalk |
| 01.00 | News – Weather |
| 01.30 | Holiday |
| 02.00 | News – Weather |
| 02.30 | Reporters: »Global Warming« |
| 03.00 | News – Weather |
| 03.30 | Asia Today |
| 03.45 | World Business Report |
| 04.00 | News – Weather |
| 04.30 | HARDtalk |
| 05.00 | News – Weather |
| 05.30 | Top Gear |
| 06.00 | News – Weather |
| 06.30 | Reporters: »Global Warming« |
| 07.00 | News – Weather |
| 07.30 | HARDtalk |
| 08.00 | News – Weather |
| 08.30 | Simpson's World |
| 09.00 | News – Weather |
| 09.30 | HARDtalk |
| 10.00 | News – Weather |
| 10.30 | Holiday |
| 11.00 | News – Weather |
| 11.30 | Simpson's World |
| 12.00 | News – Weather |
| 12.30 | HARDtalk |
| 13.00 | News |
| 13.15 | World Business Report – Weather |
| 13.30 | Top Gear |
| 14.00 | News – Weather |
| 14.30 | Simpson's World |
| 15.00 | News – Weather |
| 15.30 | Asia Today |
| 16.00 | News – Weather |
| 16.30 | HARDtalk |
| 17.00 | News |
| 17.15 | World Business Report – Weather |
| 17.30 | Talking Movies |
| 18.00 | News – Weather |
| 18.30 | World Business Report |
| 18.45 | World Sport |
| 19.00 | News – Weather |
| 19.30 | HARDtalk |
| 20.00 | News – Weather |
| 20.30 | Click Online |
| 21.00 | News – Weather |
| 21.30 | World Business Report |
| 22.00 | News – Weather |
| 22.30 | Panorama |
| 23.00 | News – Weather |
| 23.30 | World Business Report |
| 23.45 | Asia Today |

### TV3 Viasat

| | |
|---|---|
| 05:00 | Børne-hjørnet med Disney |
| 07:30 | TV-shop |
| 08:45 | Blossom |
| 09:10 | Alias Smith & Jones |
| 10:00 | Hvide Løgne (G) |
| 10:30 | Horton-sagaen (G) |
| 11:20 | Horton-sagaen |
| 12:10 | Melrose Place - classic |
| 13:05 | Vild med dig |
| 13:30 | Panter-tanter |
| 14:00 | Mig og fremtiden |
| 14:55 | Baywatch |
| 15:45 | Min kære familie |
| 16:10 | Ricki Lake |
| 17:10 | Dagens Nyheder på TV3 |
| 17:30 | Susan - sød og single |
| 18:00 | Alle tiders barnepige |
| 18:30 | Hvide Løgne |
| 19:00 | Torsdagsbio: Min bedre halvdel |
| 20:40 | Heksene fra Warren Manor |
| 21:35 | Action |
| 22:05 | Dagens Nyheder på TV3 |
| 22:15 | Drøm videre |
| 22:45 | Nash Bridges |
| 23:35 | Kojak |
| 00:35 | Strømer i L.A. |
| 01:00 | Ti tommelfingre |
| 01:25 | Simpsons |
| 01:50 | Ellen |
| 02:15 | Ricki Lake (G) |
| 03:10 | Godnat |

### Útvarp Føroya

| | |
|---|---|
| 07.00 | Tíðindi |
| 07.05 | Morgunlestur<br>Hanus A. Samuelsen í Hoyvík lesur |
| 07.15 | Barnaløtan<br>Katrin Nolsøe Joensen og Kári Sólstein stíla fyri |
| 07.30 | Tíðindi |
| 07.35 | Morguntónleikur |
| 08.00 | Tíðindi |
| 08.03 | Morgunrásin |
| 09.00 | Tíðindi |
| 09.03 | Morgunrásin |
| 09.50 | Morgunlestur (e)<br>Hanus A. Samuelsen í Hoyvík lesur |
| 10.00 | Tíðindi |
| 10.03 | Fyrrapartsløg<br>Kim Hansen stílar fyri |
| 11.00 | Tíðindi |
| 11.03 | Upplestur (e) |
| 11.30 | Undir døgurða |
| 12.00 | Veðurtíðindi |
| 12.02 | Middagstónleikur |
| 12.15 | Skráin og lýsingar |
| 12.20 | Tíðindini |
| 12.40 | Døgurðatónar |
| 13.00 | Heimurin í dag (e)<br>Suni Merkistein stílar fyri |
| 13.30 | Tónleikur |
| 14.00 | Fimmarin (e)<br>Sigmar Bláberg leggur til rættis |
| 15.00 | Tíðindi |
| 15.03 | Frívaktin<br>Sending við tónleiki og práti um sjómanslív.<br>Elis Poulsen skipar fyri |
| 16.00 | Tíðindi |
| 16.03 | Brót<br>Næmingar úr miðlabreytini á Argjum skipa fyri |
| 17.00 | Tíðindini |
| 17.05 | Í Víngar_inum<br>Alexander Samuelsen leggur til rættis |
| 18.05 | Barnaløtan (e)<br>Katrin Nolsøe Joensen og Kári Sólstein stíla fyri |
| 18.25 | Skráin og lýsingar |
| 18.30 | Tíðindini |
| 19.00 | Tilvera - Pokémon<br>Armgarð Arge leggur til rættis |
| 19.30 | Harmonikutónar<br>Flóvin Jacobsen skipar fyri |
| 20.30 | Á sanganna veingjum<br>Gunnvør Poulsen stílar fyri |
| 21.00 | Tíðindi |
| 21.05 | Dagsetur<br>Ginna Midjord skipar fyri |
| 22.00 | Rák<br>Anita Ottosen stílar fyri |
| 23.00 | Tíðindi |

### Rás 2 FM 102 FM 107

*Eingin skrá komin,*

*sí heimasíðu: www.ras2.fo*

### Lindin

| | |
|---|---|
| 13.00 | Byrjan — Dagsskrá |
| 13.15 | Okkara dagliga breyð |
| 13.30 | Sjómanssendingin Vitin (e) |
| 14.30 | Tónleikur fyri børn |
| 15.00 | Tónleikur |
| 17.00 | Ungdómssendingin Get Ready v/ Rigmor og Rebekku |
| 18.00 | Dagsins Orð |
| 18.05 | The Finishing Touch - ensk sending við tónleiki og práti. Vertur er Alex O'Campo |
| 19.00 | Brot og bitar ein ørvísi tíðindasending. |
| 19.05 | »The Finishing Touch« heldur fram |
| 20.00 | Tónleikur fyri børn |
| 20.30 | Okkara dagliga breyð |
| 20.55 | Dagsins Orð |
| 21.00 | Bønarlinjan við gesti - Bønarevni kunnu ringjast inn frá kl. 20.00. Tlf. 321377 og til ber at senda fax á nr. 321379 |

Vit gevast uml. middnátt

**Hóskvøldið kl. 19.00**

## Tilvera – Pokémon




Kortspælið Pokémon hevur rættiliga fingið fótafestið millum børn í vesturheiminum.

Mong undrast á, hvat hetta veruliga er, og um spælið kann geva børnunum nakað gott yvirhøvur.

Í sendingini kanna vit, hvaðani hetta fyribrigdið stavar, og hvat teir ymisku persónarnir í spælinum hava at týða.

Allir persónarnir í Pokémon hava ein týdning, og spælið hevur sín uppruna í japansku shinto religiónini.

## Við langfaraskipi á Flemish Cap 1:2 (e)




Familja og kenningar vóru á bryggjuni í Klaksvík og søgdu farvæl, tá rækjutrolarin Gilstón í februar 1997 legði vestur um hav við kós móti Flemich Cap. Enn ein langfaratúrur var byrjaður, og manningin kundi síggja fram til 6 mánaðir á havinum, mangan í baldrutum veðri. Zacharias Hammer var við á túrinum og vit fáa eina lýsing av lívinum umborð.

*Fotografur: Zacharias Hammer. Klipt: Bjarnheðin í Hoyvík og Zacharias Hammer. Lagt til rættis: Zacharias Hammer.*

*Seinni partur verður sendur næsta hóskvøld*

## Mín betri helmingur

*– Amerikanskur skemtifilmur frá 1984*

**Hóskvøldið kl. 19.00**



Steve Martin og Lily Tomlin hava høvuðsleiklutirnar í skemtiliga leikinum. Tann sera ríka, men sjúka Edwina Cutwater kennir á sær, at hennara dagar eru taldir. Hon hevur ongantíð kunnað notið lívið, tí at hon antin sat í rullistóli ella lá í songini, so hon tekur avgerð um at taka kjansin.

Ein tibetanskur meditatións- guru, Prahka Lasa, skal flyta sálina hjá Edwinu yvir í kroppin hjá Bob Hoskins. Tá sakførarin Roger Cobb, sum skal broyta nakað í testamentinum hjá Edwinu, av tilvild kemur framvið, endar Edwina ístaðin í hansara kroppi!

Nú hevur Edwina valdið á høgru helvt av hansara kroppi, meðan hansara egna sál hevur harradømi yvir vintru, og av hesum standast nakrar stuttligar konfliktir.

ítróttur

Nr. 3 • fríggjadagur • 5. januar 2001 • 75. árgangur • www.sosialurin.fo

# Kunnleikin er lítil

**Landsliðsvenjarin, Palli Joensen, kennir ikki tað stóra til mótstøðuna, men tá rumenar heldur ikki kenna okkara lið, kann hetta bert verða ein fyrimunur, heldur hann**

LANDSDYSTUR
*Jákup Mørk*

Mikukvøldið hevði landsliðið eina stutta venjing, har seinastu smálutirnir undan dystunum móti Rumenia vórðu pussaðir av.

Eftir hetta varð endaligi hópurin úttikin, og framgongur hesin aðrastaðni á hesi síðu. Tað skal tó viðmerkjast, at hópurin ikki er meira endaligur enn so, at tað við evstamark okkara framvegis var ivamál, hvørt Áki Olsen fór at verða tøkur til dystin, og í hansara stað er Bjarni Wardum tikin út, soleiðis at hópurin nú telur 13 mans.

### Kenna lítið til mótstøðuna

Eftir venjingina hittu vit landsliðsvenjaran, Palla Joensen, og einki er at ivast í, at hann er spentur, nú tað av álvara er farið at stunda til stóru uppgávuna.

Eftir venjingina vóru leikararnir í fitta løtu savnaðir í einum ringi, har venjararnir báðir, Palli og Daniel, hvør í sínum lagi góvu leikarunum nøkur góð ráð at hava í huganum upp til dystirnar. Vit spurdu sjálvandi Palla, hvørji hesi góðu ráðini fyrst og fremst høvdu verið.

– Fyri tað fyrsta vil eg siga, at ráðini frá okkum vóru kanska nakað avmarkað, tí vit kenna so lítið til rumenska liðið. Vit hava roynt at spurt okkum fyri hjá onkrum keldum, men liðið er somikið fekst, at so at siga einki fekst at vita. Einki uttan tað, at liðið fyri stuttum luttók í eini sterkari kapping, har teir endaðu miðskeiðis millum luttakandi liðini. Hinvegin vita teir heldur einki um okkum, so har standa vit helst á jøvnum føti.

Men kann tað so hugsast, at ein góð byrjan frá okkara síðu kann ørkymla mótstøðuna, nú vit vita, at liðið er somikið fekst og ungt?

Ja, hatta er sjálvandi ein spennandi spurningur. Hóast vit neyvan kunnu loyva okkum at hugsa soleiðis, so kann tað vera torført hjá einum slíkum liði at sleppa undan at undirmeta okkum. Úrslit frá fortíðini og nútíðini sita allar helst onku staðni í høvdinum hjá teimum, so tað kann gerast ein torførur leiklutur fyri teirra viðkomandi. Verður tað so, so er tað ikki annað enn ein fyrimunur hjá okkum.

### Støddin einki at siga

Tá vit í blaðnum í gjár tosaðu við Daniel Rápa, sum jú kennir nakað til rumenskan hondbólt, vísti hann millum annað á, at rumenska liðið hevur onkrar ógvuliga stórar og skotsterkar bakkar. Vit spurdu eisini landsliðsvenjaran, hvussu teir ætla at byrja upp fyri hesum.

– Tað at teir hava stórar bakkar, eigur so ikki at koma óvart á nakran. Hinvegin, so er sera týdningarmikið hjá okkum at sleppa frá tankagongdini um, at jú hægri teir eru, betri eru teir.

– Júst hetta var kanska nakað av tí mest positiva, sum vit fingu burtur úr venjingarleguni í Danmark. Har sluppu vit at royna okkum móti liðum, sum á pappírinum vóru sterkari enn vit, men kortini stóðu vit okkum væl, og kundu í roynd og veru vunnið allar dystirnar.

Júst hetta við stórum leikarum hevur ofta verið ein trupulleiki í verjupartinum, tá føroysk lið hava roynt seg í altjóða høpi. Í øllum førum um talan er um skotsterkar menn, tí sleppa hesir ov nær, er eingin góða mamma, tá skot verða latin av. Eisini á hesum øki, heldur landsliðsvenjarin seg hava fingið nógv burtur úr venjingarferðini.

– Hatta er eisini ein partur, sum vit hava arbeitt nógv við. Vit høvdu í byrjanini ein heldur defensivan verjustíl, har vart varð við flatari verju, har vit so royndu at blokka skotroyndunum. Tað vita vit, at vit verða revsaðir fyri ímóti slíkum liðum, og tað hava vit so arbeitt miðvíst við at broyta.

– Hesin trupulleikin er nú um at vera burtur. Menninir vilja og tora longur út at verja, og serliga var hetta sjónligt í seinasta dysti okkara í Danmark, sum var móti Danmark.

– Tá sóu vit fleiri góðar lutir, sum eg fegin vil síggja aftur í dag. Bæði í álopspartinum, har vit fingu bæði breidd og dýpd í spælið, men so sanniliga eisini í verjupartinum, har vit sóu leikarar, sum tordu at koma út. Hetta seinna ger, at rennimynstrini hjá mótstøðuni verða brotin, og tað er júst tað, sum vit skulu royna.

### Trúgvin er týdningarmikil

At enda spurdi vit so venjaran, um liðið hevur sett sær nøkur ávís mál við dystunum, men ikki er líkt til, at hetta er tað, sum liggur fremst í huganum hjá venjaranum.

– Eg tori so slettis ikki at fara seta tøl uppá, hvat vit kunnu uppnáa í dystinum. Eg verið kanska heldur ikki vónbrotin, um úrslitið ikki verður so fantastiska gott. Sjálvsagt vil eg fegin, at so verður, men um eg veit, at menninir hava givið alt tað teir kunnu, og spælt upp til sítt besta, so eri eg nøgdur.

– Lat meg so eisini leggja afturat, at geva okkara menn sítt besta, so er tað eisini gott. Vit hava ein góðan hóp, har menninir eisini trúgva upp á egin evni, og hetta seinasta er kanska tað týdningarmesta av øllum.



*- Vit mugu fyri alt í verðini ikki halda, at leikararnir eru betri, jú størri teir eru, sigur landsliðsvenjarin*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

### Føroyski landsliðshópurin

Johan Danielsen, StÍF
Jens Skipagøta, Kyndil
Martin Hummeland, VÍF
Halgir Dahl Olesen, H71
Ingi Olsen, VÍF
Sámal Joensen, VÍF
Johnny Joensen, VÍF
Janus Einar Sørensen, VÍF
Hans Áki Dal Christiansen, Kyndil
Áki Olsen, VÍF
Marius Joensen, StÍF
Mortan Hansen, Tjaldur
Bjarni Wardum, Kyndil

# Áki er ivasamur

**Við evstamark okkara var framvegis sera ivasamt, um Áki Olsen fór at verða tøkur til dystirnar móti Rumenia**

LANDSDYSTUR
*Jákup Mørk*

Einki er at ivast í, at Áki Olsen vanliga telist millum teir tryggastu í landsliðssessinum, men tá vit tosaðu við hann hósmorgunin, var hann alt annað enn vísur í, at hann fór at vera á vøllinum.

Orsøkin er skaðin í fótliðnum, sum Áki hevur drigist við, síðani VÍF í oktober mánaði leikti móti Kyndli. Síðani tá hevur Áki tó spælt nakrar nakrar dystir, men nú um jólini versnaði skaðin aftur. Kanska orsakað av møði eftir nógva venjing.

### Torfør avgerð

Um vónirnar fyri at spæla móti Rumenia, var Áki sum sagt sera ivasamur, tá vit tosaðu við hann hósmorgunin.

– Akkurát nú veit eg slettis ikki, hvørju støðu eg fari at taka. Tað verður nakað, sum eg taki støðu til í kvøld, men eg skal ikki dylja, at tað er ein torfør avgerð.

– Sjálvsagt vil eg fegin vera við, og til ein slíkan dyst kann mann eisini bíta nakað av pínu í seg. Hinvegin er spurningurin eisini, um liðið ikki hevur betri av, at ein spælari, sum er 100% klárur, spælir, heldur enn at onkur fer hálvskaddur á vøllin.

– Har umframt eru jú eisini dystir tey bæði komandi vikuskiftini, og hesum vil eg eisini vera partur av, so tað eru fleiri lutir, sum fara at ávirka støðutakan mína.